# Gøtu skúli skal útbyggjast

**Eysturkommuna noyðist at læna 13 mió. krónur til at útbyggja Gøtu skúla**

SKÚLI
*Randi Jacobsen*
*randi@sosialurin.fo*

Býráðið í Eysturkommunu samtykti mánakvøldið at keypa 530 fermetrar av jørð við Gøtugjógv í sambandi við, at skúlin skal útbyggjast næsta ár.

Bráðfeingis tørvur er á fleiri skúlastovum í Gøtu skúla, tí árgangirnir, sum ganga skulu har, eru so stórir.

Skulabygnaðurin verður, at 1. til 3. flokkur skulu ganga í skúlanum í Leirvík, og 4. til 7. flokkur við Gøtugjógv.

Byggjast skulu 400 fermetrar aftrat, og útbyggingin skal vera liðug, tá nýtt skúlaár byrjar aftur í august næsta ár.

Útbyggingin kostar 17 mió. krónur, og kommunan fer at læna 13 mió. krónur, sigur Jóhan Christiansen, borgarstjóri.




*Gøtu skúli hevur bráðfeingis tørv á fleiri skúlastovum, og tí skal útbyggingin verða liðug til komandi skúlaár*

## Dýrari grundstykki í Eysturkommunu

**Um eitt ár fara grundstykkini í Gøtu og í Leirvík at kosta tvær ferðir so nógv sum nú, og íbindingargjaldið fer eisini upp**

GRUNDSTYKKI
*Randi Jacobsen*
*randi@sosialurin.fo*

Tá ið býráðið í Gøtu kommunu legði fíggjarætlanina, varð tosað um, at kommunan seldi grundstykkini alt ov bíliga. Tað ráddi um at fáa útstykkingar at hanga saman fíggjarliga.

Tí samtykti býráðið mánakvøldið at hækka prísirnar á grundstykkjum, og tað verður gjørt í trimum umførum.

Í dag kosta grundstykki í Eysturkommunu 150 krónur fermeturin, og íbindingargjaldið er 5.000 krónur. Á nýggjárinum verður fermetraprísurin 200 krónur metur, 1. juli 250 krónur, og 1. januar 2011 300 krónur.

Íbindingargjaldið hækkar somuleiðis í trimum umførum og verður um eitt ár 20.000 krónur, fýra ferðir so stórt sum nú.

Meginreglan er, at kommunur ikki mugu hava útreiðslur av útstykkingum.

